# Miðlamjarr

At uppdraga tannáringar er sum at negla gelé upp á ein pela.
***Kvinna, 35 ár***

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein / Inna Törnroos



*Nei, eg vil ikki hava tykkum norður.*

Anfinn Kallsberg við blaðmann hjá Dimmalætting. Løgtingsmaðurin vil heldur gera samrøðu umvegis telefonina (Dimma)

*Eg eri púra paff*

Løgtingsmaðurin Sjúrður Skaale, tá ið hann fær at vita, at hann hevur forsømt mest í løgtinginum higartil hesa tingsetuna (Sosialurin)





Kann man kalla eina lokala tónleika kapping fyri Planet Awards? Tað næsta verður væl, at sterkasti maður í Kollafirði kann kalla seg Mr. Universe.
***Maður, 45 ár***

Fyrr var vanligt, at 2 foreldur høvdu 4 børn. Nú er ikki óvanligt, at 2 børn hava 4 foreldur :)
***Maður, 55 ár***

*Høvdu 82 fólk í Føroyum atkvøtt øðrvísi, hevði eg blivið forsætisráðharri, og so hevði eg ikki verið á lívi í dag.*

Uffe Ellemann-Jensen, sum tapti fólkatingsval tepurt, fekk hjartatrupulleikar stutt eftir valið (Euroman)



*Kinna er et selvbestaltet kunstorakel, der bare ved at sige buh og bæh, forventer at folk sigur »uhh!« og »Næh!«*

Listamaðurin Ole Wich ummælir ummælara (Sosialurin)

*Líta vit aftur á árið 2010, kunnu vit tíverri ikki fáa eyga á nøkur nýggj frambrot til frama fyri fólk, ið bera brek. Okkara nýggjárslyfti fyri 2011 má tí vera, at vit skula bøta um hesa gongd.*

Annika Olsen, landsstýriskvinna



Finnland, heimsmeistari í PISA. Uppskrift: dugnaligir lærarar og sjálvstøðug børn við ábyrgdarkenslu! Hmmm... Tað mátti ikki kostað allaverðina at gjørt!
***Kvinna, 38 ár***



*Summar kvinnur fylgja einum manni, aðrar fylgja teirra dreymi. Minst bara til, at karrieran hjá tær vaknar ikki ein morgun og sigur við teg, at hon elskar teg ikki meira*

Poppstjørnan Lady Gaga hugleiðir um lívið (Entertainment Weekly)